# Ein søga um skóleistar - grundarlag undir list

FRAMSÝNING

Audrey Croc hevur í døgunum 1.–6. mars eina listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Formað listarverkini hava tráður, ull, ein søga um bundnar skóleistar og ein ferð til Føroya í mars-apríl 2001.

Audrey Croc er frá Fraklandi, er 23 ára gomul og hon gongur á listaskúla í Rennes, Bretagne. Listarliga arbeiðir hon við tekning, máling, video og samansetingum, ið alt skapar eina heild.

Tey verk, hon sýnir fram í Smiðjuni, fara at broytast ígjøgnum framsýningina, tí Audrey arbeiðir við myndunum á sjálvari framsýningini. Náttúrutilfar sum jørð, tráður, ull og plantur brúkar hon nógv av, tí henni dámar teirra viðbreni. Íblásturin kemur frá at ferðast og síggja øðrvísi landsløg og umhvørvi, og hetta hjálpir henni eisini at skapa listina.

Croc hevur funnið nógv sambond millum føroyskt landslag og siðvenju og sín listarliga áhuga. Tá hon var her fyrstu ferð í 2001, hitti hon nógv fólk úr Svínoy, Nólsoy, Gásadali, Koltri, Trøllanesi og Havnini, sum binda, og hetta hevur vakt hennara áhuga fyri binding. Hon var millum annað og vitjaði á Tøting í Gøtu, og har fekk hon upplýsingar um føroysku ullina, og um, hvussu hon skal virkast. Hon búði eisini á eini útoyggj millum bóndir og seyðamenn, og sigur hon, at hetta var eisini sera kveikjandi.

Audrey er nú komin aftur til Føroya, og við sær í kuffertinum hevur hon listarligt arbeiði, ið er sprottið burturúr hesum upplivingunum, og framsýningin í Smiðjuni er ein háttur at deila hesar upplivingar við teimum, sum hava verið orsøk til tær.

Framsýningin er opin hvønn dag frá klokkan 15 – 20 frá 1. til 6. mars.

Til ferniseringina spæla fríggjadagin spæla Kristian Blak, Mikael Blak og Brandur Jacobsen. Teir spæla klokkan 17, og síðani aftur sunnudagin klokkan 15.

**-ib**

# Ragnar og Honky Tonk Memories

**Í dag kemur onnur fløgan við vælkenda countrytónleikaranum, Ragnar í Vík, út á marknaðin**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*


*Ragnar í Vík gevur í dag sína næstu fløgu út. Hon eitur Honky Tonk Memories*

Vónirnar kunnu ikki sigast annað enn at vera góðar, tí 4000 eintøk av fløguni, eru prentað í Týsklandi. Herav eru 2000 gjørt til PR. 800 fløgur verða sendar um allan heimin, mest í Evropa, men tó eisini til New Zealand og Avstraliu. Útvarpsstøðir kring allan heim fáa fløguna senda, so møguleiki verður eisini at hoyra Ragnar um tú so er staddur í Ameriku.

Fløgan er innspæld í South Pittsburg, Tennessee, USA í oktober mánaða í fjør. Mike Headrick hevur framleitt fløguna.

Tað, sum Ragnar heldur er mest áhugavert við fløguni er, at tann kendi steelguitaristurin, Don Helms, sum hevur spælt fyri Hank Williams, spælir steelguitar eisini á fløguni hjá sær. Don Helms setur ein serligan dám á fløguna.

Sekstan løg eru á fløguni, og tað eina lagið hevur Ragnar skrivað orðini til, og Jógvan Tróndarson hevur gjørt lagið.

Fløguverkætlanin er gjørd í samstarvi við Kristian Blak (Tutl) og Mike Headrick.

Í dag frá klokkan 14–17 er Ragnar í Vík at hitta við Shellstøðina við Streymin, har hann signerar fløguna til teirra, ið hava hug at ogna sær hana.

# Matiné í Havnar Kirkju

Í dag, 2. mars, verður marsmatiné í Havnar Kirkju. Á skránni er kamartónleikur eftir Mozart og Beethoven. Kvartett í fýra satsum fyri floytu, violin, viola og cello eftir W. A. Mozart og Trio í fimm satsum fyri violin, viola og cello eftir Ludvig van Beethoven. Tónleikararnir eru: Katja Volovelskaja, floyta, Kanny Sambleben, violin, Nikos Kapnas, viola, Jens Christian Guttesen, cello. Matinéin byrjar klokkan 11.30.

**-ib**




# Caravanferð í Skotlandi

**1 vika í Caravan í Nairn í apríl og mai 2002**

Atlantic Airways Caravan í Nairn.
Vit hava tveir ekslusivar "Caravans", sum vit hava serútgjørt til føroyingar.
Teir standa á vakra Nairn økinum sum liggur út til strondina.



**Nairn**
Nairn Lochloy er vakurt umráði framvið Moray-fjørðin. Tað tekur 20 minuttir til Inverness og 1 tíma við toki til Aberdeen. Tað tekur 10 minuttir til gongu til miðbýin í Nairn.

**8 persóns Caravan**

| | |
|---|---|
| 2 vaksin og 3 børn | **8.400,-** |
| 4 vaksin og 4 børn | **12.442,-** |
| 8 vaksin fyri hvønn | **1.890,-** |

**6 persóns Caravan**

| | |
|---|---|
| 2 vaksin og 2 børn | **7.350,-** |
| 2 vaksin og 4 børn | **9.154,-** |
| 6 vaksin fyri hvønn | **1.970,-** |

Ferðaavgjald er íroknað prísin.

Flutningur til og frá flogvøllinum í Aberdeen er ikki íroknaður.

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



Hotel Føroyar ★★★★

*Starv*

YVIRTÆNARI

*Søkt verður eftir yvirtænara til okkara matstovu at byrja skjótast tilber.*

***Starvið***
*Talan er um eitt leiðarastarv við tilvísing til stjóran. Yvirtænarin fær ábyrgdina av:*
- *Eini professionellari kundatænastu, sum svarar til eitt hotel við 4 stjørnum*
- *Rakstrinum av matstovuni, veitslu- og fundarvirkseminum*
- *Vøruinnkeypi og vørugoymslum*
- *Starvsfólkaviðurskiftum*
- *Øðrum viðkomandi uppgávum*

***Umsøkjarin hevur***
- *Viðkomandi útbúgving*
- *Leiðsluroyndir, vilja og evni til at royna nýggjar leiðir*
- *Góðan kunnleika til mat og vín*
- *Góðan teldu- og málkunnleika*
- *Professionellan hugburð*
- *Góð samstarvsevni*

***Vit bjóða***
- *Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv*
- *Fakligar avbjóðingar*
- *Eitt dynamiskt arbeiðspláss*
- *Gott samanhald*
- *Kappingarførar setanartreytir*

*Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Johannes Jensen, stjóri á 31 75 00.*

*Umsókn sendast til:*

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*FO-110 Tórshavn*

*innan 18. mars 2002.*

petur & petur • 320870

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Hotellið hevði í 2001 2,5 mió. í rakstraravlopi og eina eginogn uppá DKK 8,4 mió. Miðaltal av starvsfólki í fjør var 46.*




# Bólturin er hjá Tipstænastuni

**P/F Ítróttarvedding og danska Tipstænastan eru at kalla vorðin samd um ein nýggjan fimm ára sáttmála. Eitt punkt skilir tó partarnar, og tí er sáttmálin ikki undirskrivaður enn**

TIPSPENGAR
*Stefan í Skorini*


*Heðin Mortensen fegnast um, at Tipstænastan vil gera ein fimm ára sáttmála, eftir at hon hevði boðað frá, at hon bara vildi gera sáttmála í eitt ár*

Líkt er til at føroyingar sleppa at spæla lotto, tippa og keypa danskar skaviseðlar í fimm ár afturat.

Sáttmálin millum P/F Ítróttarvedding, sum hevur einkarætt til slíkt virksemi í Føroyum, og donsku Tipstænastuna gekk út í gjár, og partarnir hava samráðst seinastu dagarnar.

Tipstænastan hevði boðað frá, at hon ikki vildi gera sáttmálan longri enn eitt ár, áðrenn hon visti, hvat landsstýrið ætlaði á hesum økinum, nú tos hevur verið um eitt umfatandi landsspæl.

Ítróttarvedding vildi ikki boyggja seg fyri hesum kravi, tí felagið vildi hava ein longri sáttmála. Felagið segði í brævi til Tipstænastuna, at teirra virksemi í Føroyum ikki verður ávirkað av einum møguligum landsspæli hjá landsstýrinum.

Hetta fekk eftir øllum at døma Tipstænastuna at broyta støðu enn einaferð. Hósdagin bjóðaði hon Ítróttarvedding ein fimm ára sáttmála, sum føroyska felagið tekur undir við.

## Góðtaka ikki minking

Eitt punkt skilir partarnar. Tað er, at Tipstænastan vil hava felt í sáttmálan, at Ítróttarvedding góðtekur eina minking av afturberingini av peningi, um lógin verður broytt í Fólkatinginum.

Løgfrøðingar hjá føroyska felagnum kannaðu sáttmálan í gjár, og Ítróttarvedding vil ikki skriva undir, um hetta punktið ikki verður broytt. Tí er ikki heilt greitt, um sáttmálin verður undirskrivaður.

Heðin Mortensen torir ikki at siga, um hesin spurningurin fer at skilja partarnar, men hetta av stórum týdningi hjá føroyingum.

Heðin Mortensen segði við Sosialin í gjár, at hann fór at gera alt at forða fyri, at føroyski parturin av køkuni verður minkaður. Føroyar fáa í løtuni 0,5 prosent av yvirskotinum hjá Tipstænastuni. Hetta er einar 6,5 milliónir krónur. Harumframt vinna føroyingar einar 7-8 milliónir árliga.

# Rás Tórshavn heldur fram

**Framhaldssøgan um nógv umtalaðu Rás Tórshavn heldur fram. Síðst í januar mánaða varð gjørd avtala um, at Rás Tórshavn skuldi halda fram ein mánaða afturat, har Býráðið og Føroya Tele deildu útreiðslurnar. Henda avtala verður longd til ein mánaða afturat**

RÁS TÓRSHAVN
*Ingrid Bjarnastein*

–Vónandi verður alt klárt hjá Føroya Tele at yvirtaka í mars mánaða, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Føroya Tele hevur nú fingið neyðugu loyvini frá Vinnumálastýrinum, sum skulu til fyri, at teir skulu sleppa at senda sjónvarp. Nú vanta bert at fáa nøkur smáting uppá pláss uttanlands.

–Vit helst at gera avtalu við Føroya Tele um at leingja avtaluna, sum vit gjørdu seinasta mánaða, í ein mánaða afturat, greiðir Jan Christiansen frá. – Um hálvan mars skuldi alt so verið uppá pláss hjá Føroya Tele, so teir fáa yvirtikið nakrar av rásunum í endanum av mars.

Enn er ikki greitt um Føroya Tele skal yvirtaka allar fimm rásirnar á Rás Tórshavn. Ongin endalig avtala er gjørd enn, men tað liggur í luftinia, at fyrst vera tvær ella tríggjar rásir yvirtiknar, og so seinni verður restin yvirtikin. Men onki av hesum er rættiliga greitt enn, tí alt skal leggjast fram fyri býráðið fyrst. Hetta er bert samráðingarstøðið.

Sum er nú, so verður BBC World og Prime á Býráðsins hondum, í øllum førum í eina tíð afturat.


*Rás Tórshavn heldur fram á Býráðsins hondum í øllum førum mars mánaða afturat*

# Aldubáran í Listaskálanum

**Leygardagin verður Várkonsertin í Listaskálanum í Havn við bólkinum Aldubáruni, sum eisini fer at spæla í sambandi við upplatingina av árligu Várframsýningini**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*


*Sámal Petersen á violin, Ólavur Jakobsen við gittaranum og Andrea Heindriksdóttir við floytu fara leygardagin saman við Jóhannesi Andreasen at hava konsert í Listaskálanum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fýra limir í Aldubáruni fara leygarkvøldið at hava forvitnisliga konsert í Listaskálanum í Havn. Tá er Várkonsertin á skránni.

Tónleikararnir, sum fara at spæla, eru Jóhannes Andreasen, sum spælir klaver, Andrea Heindriksdóttir á floytu, Ólavur Jakobsen spælir gittar, Sámal Petersen á violin.

Teir fara at spæla fimm nýggj føroysk verk á konsertini. Verkini eru Chain Dance og Echoes of the Past eftir Sunleif Rasmussen, Summartónar og Magma eftir Atla Petersen og CTR, ið Tróndur Bogason hevur komponerað.

Konsertin verður leygarkvøldið klokkan 19. Árliga Várframsýningin við myndlist letur upp leygardagin klokkan 16, og Aldubáran fer eisini at spæla í sambandi við upplatingina av listaframsýningini. Tá verða brot úr Várkonsertini spæld.

# Fekk longda fongsling

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Ein 27 ára gamal føroyingur, sum er skuldsettur í stóra narkomálinum, kom hósdagin fyri í Føroya Rætti, tí freistin fyri avbyrgingini var úti.

Dómarin helt, at grundarlag var fyri at leingja avbyrgingina í tvær vikur, sum ákæruvaldið mælti til. Maðurin tók ikki við avgerðini og hevur kært hana til Eystara Landsrætt.

Landsrætturin fekk málið fríggjadagin og skuldi taka støðu so skjótt sum gjørligt.